## DAGSINS MEINING

# SvF í 20 ár

Sjónvarp Føroya hevur í hesum døgum 20 ára hátíðarhald, og vit vilja við hesum ynskja stovninum hjartaliga tillukku. Tá hugsað verður um, hvussu lítið, ið upprunaliga varð ætlað við SvF, má ásannast, at stovnurin hevur megnað at ment seg við avmarkaðum fíggjarligum tilfeingi.

Í einari av jubileumssendingunum varð upplýst, at tað er sjey ferðir so dýrt at framleiða sjónvarp sum útvarp. Tá hugsað verður um hesi tøl, so má eisini ásannast, at tað er sera torført at gera sjónvarp í Føroyum av tí einføldu orsøk, at tað er so kostnaðarmikið.

Við kostnaðarstøðinum í huga eigur SvF at nýta høvi at umhugsa, hvar stovnurin framyvir skal leggja sína orku.Er nøkur meining í at royna at hava alt, sum hini hava? Hevði tað ikki verið skilabest at lagt orkuna har, sum tørvurin er størstur og har vit av góðum grundum eru best, nevniliga til føroyskt tilfar. So er spurningurin, hvat slag av føroyskum tilfari. Her kann leiðslan í SvF valla koma uttanum, at tørvurin er størstur á góðum barna- og ungdómssendingum. Her haltar í dag, hóast tær sendingar til børn, sum eru, eru stak góðar. Men her manglar enn tilfar til tey hálvvaksnu, tey millum og 13 og 17 ár.

Tíðindi hava av góðum grundum høga raðfesting í SvF. Her átti stovnurin framyvir at lagt seg eftir føroyskum tíðindum. Tað er ivaleyst tað, sum hyggjarin vil hava. Tey flestu hava í dag alternativar kanalir, har tey fáa altjóða tíðindi hvønn tíma. Nógv hevur verið tosað um public service í hesum døgum og rætt er, at hetta hevur stóran týdning. Um SvF ikki í størri mun framyvir livir upp til alment viðurkend public service krøv, fer almenningurin í longdini ikki at góðtaka at rinda 2000 kr. um árið til SvF. Public service krøvini merkja, at stovnurin skal vera óheftur, hava objektivan og breiðan tíðindaflutning, stovnurin skal røkka øllum borgarum og dekka tørvin hjá øllum samfelagsbólkum uttan mun aldur, átrúnað og politiskan lit. Tað skal vera okkara ynski, at SvF í framtíðini fer at megna hesi krøv í størri mun enn í dag. Eydnast hetta verður SvF tann sterki og góði mentanarmiðilin í samfelagnum. Hetta er ein stór ábyrgd, sum vit ikki ivast í, at dugnaligu starvsfólkini í SvF fara at liva upp til í framtíðini.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Granskingarparkin

**Svenning Borg**
*Vágur*



Granskingarpark skal byggjast og er talan um at byggja hana í Kollafirði, tí at har eigur landið byggiøki tókt, sigur vinnumálaráðharrin.

Um tað er byggiøki, sum er avgerandi fyri, hvar í granskingarparkin verður bygd, vil eg meira enn gjarna leggja byggiøki til, ókeypis!

Tað skal so ikki vera undanførslan fyri ikki at byggja hana í Suðuroynni.

Eg vil hervið heita á samgonguumboðini fyri Suðuroynna einaferð enn, um at virka fyri at granskingarparkin verður bygd í Suðuroynni, okur hava harðliga brúk fyri arbeiðsplássum, stórur partur av ungdóminum í Suðuroynni býr í Havn, tað gevur ikki góð framtíðarútlit fyri oynna, men tykur í samgongu hava møguleikan at broyta gongdina við at leggja granskingarparkina í Suðuroynni.

Flestu Suðringar sum ein møtir á vegnum í Havn siga, at um tey fingu arbeiði her suðuri, fluttu tey suðuraftur at búgva, men innan fyri almenna sektorin hevur verið eiðasørt, ongin vilji hevur verið til at lagt nøkur almenn arbeiðspláss í Suðuroynni, tað má og skal broytast, okur fara ikki framhaldandi at góðtaka at vera avhektaðir lokomotivinum Føroyar.

Gongdin skal venda her og nú!

# C-vitaminir gjørdust afføringspillarar

**Jón Ellendersen**



Tað nyttar lítið, at John Johannesen slær fast, at hansara vallyfti standa við, tí hann er partur av tí samgongu, sum eigur ábyrgdina av, at Musikkskúlin nú verður skerdur niður á øklarnar.

Tað nyttar lítið, at valevnini uppundir valið kappaðust um at leggja doyðin á, at nú skuldi mentanin hava betri kor, tí leiðin henda samgonga hevur lagt er, at eingi vallyfti halda serliga leingi.

Tað nyttar lítið, at valevni aftaná valevni stóð og reypaði av okkara tónlistafólki, bæði Eivør, Teitur og øðrum tá korini at virka undir gerast so vánalig, at tey, ið vilja nakað seriøst innan tónleikin, noyðast at leita til Danmarkar, Noregis, Íslands og onnur lond, skal lív vera teimum lagað.

Ongantíð øll míni 51 ár havi eg upplivað eitt landsstýri, sum er so fólkafíggindaligt, so samfelagslíkasælt og so visiónleyst sum júst hetta landsstýrið.

Duga tit ikki at síggja, at tað er stór, stór, ja, megastór skomm at geva Musikkskúlanum eina tílíka viðferð, og hetta júst aftaná, at eitt hitt størsta tónleikabragdið í Føroyum nakrantíð, "Jósef og ótrúliga litfagra dreymakotið" hevur rent alt og øll um koll - ikki minst tey, sum hava sín uppruna í júst Musikkskúlanum.

Jú, hetta var landsstýrið, sum skuldi geva listini C-vitaminir, men tað einasta tað hevur megnað, er at geva teimum afføringspillarar í ólukkumát.

Men, er tað at undrast á? Hyggja vit at teimum monnum, sum manna landsstýrið, so skínur greitt ígjøgnum, at teir yvirhøvur ikki eru egnaðir at sita í einum landsstýri.

Jógvan við Keldu var um at taka lívið av ítróttini.

Hans Pauli Strøm var um at taka lívið av Peturi og øðrum veikum í samfelagnum.

Jógvan á Lakjuni hevur ikki verið serliga heppin við sínum leikluti í Landsskjalasavninum, og soleiðis eg skilji støðuna, verður hetta neyvan tann seinasta orrustan.

Bárur, hann dugi eg ikki at meta um, tí eg skilji ikki eitt vet av tí, maðurin ætlar, tosar um ella hugsar. Men, hann er um at taka lívið av Musikkskúlanum.

Jóannes Ejdesgaard er bara soooo keðiligur og óløgmansligur, og liggur fram eftir rommum fyri dønum, meiri enn nakar sambandsløgmaður nakrantíð hevur gjørt.

Bjarni Djuurholm er um at gera enda á suðuroyarsiglingini, og óivað fer Smyril at enda í Miðvági ella inni á Skála.

Bjørn Kalsø hevur als ongar visiónir fyri fiskivinnuna, og hvussu hart fiskivinnan rópar, hvussu hart hagtølini rópa og hvussu nógv ávaringartekin vísa, at fiskivinnan, øll sum hon er, er í stórari kreppu, so siglir Bjørn sína egnu leið sum ein hvít kalsøtufla á eini lítlari tjørn.

Men eitt, sum serkennir hetta landsstýrið, og fyri stóran part, løgtingið við er, at teir eru fullkomiliga líkasælir við, hvussu fólkið í landinum hevur tað, og Musikkskúlin er neyvan seinasta offrið á altarinum hjá hesum (áðrenn valið) so amitiøsa landsstýrinum, sum spýtur fólkið í andlitið við at jarðleggja alt stríð og arbeiði, sum undanfarna landsstýrið strýddist fyri at fáa opinleikan at virka í verki. Einki landsstýri hevur verið so afturlatið.

Taka tit lívið av Musikkskúlanum, so var frægari at tit fluttu út á Lítlu Dímum og ótu tykkara egnu afføringspillarar, tí Føroya fólk hevur ikki brúk fyri einum slíkum amatørkendum, óvirknum, initiativleysum og óvisionerum landsstýri við einum løgmanni á odda, sum eins væl kundi verið eftirlitsmaður í plantasjuni í Havn.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Rúna Sivertsen runa@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## UTTAN ÚR HEIMI

# Sakleysar kvinnur fáa skyldina kortini



**Amnesty International finst harðliga at viðurskiftunum í Turkalandi, tí myndugleikarnir har gera alt ov lítið fyri at steðga harðskapi ímóti kvinnum**

MANNARÆTTINDI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Næstan onnur hvør kvinna í Turkalandi hevur verið fyri harðskapi.

Tað sigur Amnesty International í síni nýggju frágreiðing. Felagsskapurin sigur, at turkisku myndugleikarnir hava framt ymsar ábøtur innan rættarverkið, men at alt ov lítið verður gjørt fyri at tryggja, at ábøturnar verða hildnar. Samstundis vil felagsskapurin vera við, at politikararnir eggja til harðskap ímóti kvinnum.

– Harðskapur ímóti kvinnum verður alment góðtikin, og bæði lokalir leiðarar og fólk á stjórnarstigi lata eyguni aftur, skrivar Amnesty International.

Felagsskapurin leggur ta turkisku løgregluna undir at leggja mál um harðskap ímóti kvinnum til viks, og dómstólarnir verða sagdir at geva teimum illa viðfarnu kvinnunum skyldina, sjálvt um tær eru ósekar. Tí verða skuldsetingar um harðskap ímóti kvinnum ofta vendar ímóti kvinnunum, tá saman um kemur, sigur Amnesty International.

# Enn ein CIA-stjóri frá

**Dagin eftir at George Tenet fór úr stjórastarvinum í CIA, legði njósnarastjórin frá sær**

ÚR STARVI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í gjárkvøldið kunngjørdi ein ein stjóri í amerikonsku fregnartænastuni, at hann leggur frá sær.

Tað er James Pavitt, sum hevur havt ábyrgdina av njósnarunum hjá CIA. Amerikanskir talsmenn siga, at avgerð hansara at taka seg úr starvinum hevur ikki samband við avgerðina hjá George Tenet at gevast í stjórastarvinum.

Deildin hjá James Pavitt hevur verið fyri hvøssum atfinningum teir seinastu mánaðarnar. Tað var hon, sum hevði ábyrgdina av at savna upplýsingar um Irak. Men deildin hevur eisini verið fyri atfinningum í sambandi við yvirgangsatsóknirnar at USA 11. september í 2001.

# HIV-smittað skulu skrásetast

**Danska heilsustýrið hevur gjørt av at skráseta øll HIV-smittað**

DANMARK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Í fleiri ár hava danir keglast um, hvørt tað hevði verið rætt at skipa eina skráseting við øllum, sum eru HIV-smittað. Røddir hava talað bæði fyri og ímóti, men nú hevur heilsustýrið gjørt av at skera ígjøgnum.

Sjónvarpið TV2 sigur, at heilsustýrið nú hevur gjørt av, at í framtíðini skulu øll HIV-smittað skrásetast. Øll, sum verða skrásett sum HIV-positiv, verða skrásett, men tað verður gjørt á ein slíkan hátt, at skrásetingin verður sera loynilig.

Danskir læknar eru væl nøgdir við avgerðina. Peter Skinhøj, yvirlækni, sigur við TV2, at læknarnir hava bíðað eftir einari tílíkari skráseting, tí hon verður eitt sera hent amboð í royndunum at fyribyrgja HIV.

## SARS-læknin horvin

Kinesiski hernaðarlæknin Jiang Yanjong, sum fyri einum ári síðani avdúkaði, at teir kinesisku myndugleikarnir duldu sannleikan um sjúkuna SARS, er horvin. Í Kina bleiv læknin roknaður sum hetja, tí hann setti seg upp ímóti myndugleikunum, sum royndu at dylja, hvussu nógv SARS hevði breitt seg.

Fyri nøkrum mánaðum síðani skrivaði Jiang Yanjong myndugleikunum í Beijing bræv, har hann bað teir umhugsa krøvini frá studentunum um meiri demokrati. Tann 1. juni fóru hann og konan sum vant til arbeiðis á einum hernaðarsjúkrahúsi í høvuðsstaðnum, men síðani hevur eingin sæð tey. Tey bæði eiga eina dóttur, sum býr í USA, og hon heitti í gjár á myndugleikarnar um at kanna, hvat er vorðið av foreldrunum.

Sjálv sigur Jiang Rui, at hon hevur spurt heilsumyndugleikarnar, um teir vita, hvar foreldur hennara eru, men at hon hevur fingið løgin svar. Tí heldur hon, at myndugleikarnir vita meiri, enn teir siga.

## Fyrsta skipið doypt

Spanska skipasmiðjan Izar, sum byggir tað nýggja suðuroyarskipið, byggir eisini fimm skip til tann norska herflotan, og hósdagin varð tað fyrsta navngivið. Verjumálaráðharrin, Kristin Krohn Devold, gav tí navnið "Fridtjof Nansen".

Tey fimm herskipini skulu sambært sáttmálanum kosta 16 milliardir norskar krónur. Men í seinastuni hevur nógv verið tosað um prísin, eftir at tað er komið fram, at Izar hevur fingið stóran stuðul frá sponsku stjórnini fyri at kunna kappast við útlendskar skipasmiðjur. Stjórin á skipasmiðjuni er farin frá, og ES hevur gjørt av, at Izar skal gjalda fýra milliardir krónur aftur.

Norskar skipasmiðjur royna framvegis at fáa ein part av sáttmálanum um tey fimm herskipini, men sambært Aftenposten er tað ikki serliga sannlíkt, at tað fer at eydnast teimum. Norska stjórnin hevur fingið at vita frá spaniumonnum, at øll fimn skipini verða bygd og latin norðmonnum sum avtalað.

## Fólkaatkvøða um Chavez

Myndugleikarnir í Venesuela kunngjørdu fyrradagin, at andstøðan hevur savnað nóg mikið av undirskrivtum frá fólki, sum krevja fólkaatkvøðu um framtíðina hjá Hugo Chavez, forseta. Sambært lógini skuldu minst 2,4 milliónir fólk skriva undir kravið um fólkaatkvøðu, og andstøðan sigur seg hava fingið umleið 3,4 milliónir undirskrivtir.

Sjálvur sigur forsetin, at hann er til reiðar at gera eftir kravinum frá andstøðuni. Hann ivast ikki í, at hann fer at vinna fólkaatkvøðuna, og hóskvøldið savnaðust fleiri túsund fólk uttan fyri forsetaborgina at vísa tí vinstrasinnaða forsetanum stuðul.

Tað er ikki greitt, nær fólkaatkvøða verður í Venesuela, men valnevndin hevur nevnt dagin 8. august. Verður fólkaatkvøðan fyri tann 16. august, og Chavez tapir, skal forsetaval haldast. Verður fólkaatkvøðan ikki fyrr enn aftan á 16. august, og forsetin tapir, tekur varaforsetin við. Hugo Chavez varð valdur til forseta í 2000 við stórum meiriluta.

## Sjokolátusigarettir

Stóra bretska tubbaksverksmiðjan British American Tobacco, ið millum annað ger sigarettirnar Lucky Strike, umhugsar nú at gera sigarettir við sjokolátusmakki.

Verksmiðjan hevur í seinastuni gjørt nakrar royndir við sigarettum, ið smakka av sjokolátu, men hon hevur eisini nýtt kirsuber, vanilju og sirop sum smakkievni. Ein talsmaður fyri verksmiðjuna sigur við Reuters, at royndirnar hava eydnast væl, og at tað er væl hugsandi, at verksmiðjan fer at gera sigarettir við onkrum góðum smakki.

Tað eru minni enn so øll, ið eru so fegin um royndirnar og ætlanina hjá British American Tobacco. Fyrrverandi bretski heilsumálaráðharrin Frank Dobson sigur, at eftir hansara tykki fara nógv børn at vísa teimum nýggju sigarettunum áhuga, tí tær fara at smakka so væl.